# KVINNURNAR MUGU FÁAST AT STØÐAST Í FØROYUM

Í 80 ÁR ERU **KVINNURNAR** STØÐUGT **FÆKKAÐAR** Í FØROYUM **SAMANBORIÐ** VIÐ **MENNINAR**, OG Í DAG ERU TÆR **2.000** FÆRRI ENN **MENNINIR**. HENDA GONGD MÁ VENDAST, SIGUR **KRISTIANNA WINTHER POULSEN**, FORKVINNA Í **JAVNSTØÐUNEVNDINI**, SUM HELDUR, AT **SAMFELAGIÐ** MÁ GERAST **RÚMLIGARI** VIÐ FLEIRI **VINNUMØGULEIKUM** OG **BETRI** BÚSTAÐARMØGULEIKUM. EIN **GONGD** LEIÐ KUNDI VERIÐ AT LAGT **DENT** Á ULLARVIRKING OG **SNIÐGEVING**. HUGSAST MÁ STÓRT OG **ØÐRVÍSI**, HELDUR HON, **OG** VIT KUNNU EITT NÚ BJÓÐA **ÚTLENDSKUM** KVINNUM **EKSKLUSIVA** ÚTBÚGVING Í TÍLÍKUM **FØRLEIKUM**



**JAVNSTØÐA**

Uni Arge
ua@sosialurin.fo

Javnstøðunevndin hevur aftur latið úr hondum eina ársfrágreiðing, og eins og væntast kundi, fær nevndin ikki enn staðfest, at komið er á mál í javnstøðumálum. Eitt nú mátti Javnstøðunevndin í 2010 draga ein almennan arbeiðsgevara í rættin vegna ein pápa, sum ikki fekk løn, meðan hann var í barsilsfarloyvi. Rætturin gjørdi greitt, at arbeiðsgevarin hevði brotið javnstøðulógina. Javnstøðunevndin staðfestir, at dómurin kom óvart á tey mongu, sum høvdu spátt, at hetta málið fór nevndin at tapa, men spádómarnir vóru skeivir, og við dóminum eru umstøðurnar hjá monnum í barsilsfarloyvi vorðnar munandi betri. »Soleiðis ber til at førka vanabundnar samfelagsskipanir, so tær gerast rúmligari fyri bæði kynini,« skrivar forkvinnan í Javnstøðunevndini í ársfrágreiðingini um rættarmálið, sum nevndin vann í 2010.

## Gongur spakuliga framá

At flyta fólk úr vanahugsan er ein tann størsta uppgávan og avbjóðingin hjá Javnstøðunevndini. Um okkurt altíð hevur verið so, sum tað framvegis er, kemur fáum til hugs at broyta mannagongdir og hugsunarhættir. Í eitt nú fiskivinnuni hava menn altíð rátt fyri borgum, og púra natúrligt er tí, at tá nevndir og ráð, ið fáast við fiskivinnu, verða mannað, skulu menn sita í hesum ráðunum og nevndunum. Ella er tað? Javnstøðunevndin hevur ført eitt áhaldandi stríð at minna myndugleikarnar á, at javnstøða skal havast í huga, tá fólk verða vald í nevndir og ráð, tí ger tað almenna, sum tað altíð hevur gjørt, og velur bara menn í álitisstørv, koma førleikarnir hjá mongum dugnaligum kvinnum ikki samfelagnum til góðar. Og at útihýsa tær er at meta sum kynslig diskriminering.

Sambært grein 8 í javnstøðulógini skal kynsbýtið í almennum nevndum og ráðum vera javnt, og Javnstøðunevndin hevur skyldu at fylgja við, um hendan áseting verður hildin. Nevndin hevur skrásett tøl um hetta aftur til 2000, tá kannað varð fyrstu ferð, hvussu stendur til við kynsbýtinum í almennum nevndum og ráðum. Kanningar vórðu eisini gjørdar í 2007 og aftur í 2010. Javnstøðunevndin staðfestir, at tað gongur rætta vegin á økinum, tí kynsbýtið er vorðið javnari, men komið er ikki á mál. Yvirlitið hjá nevndini vísir, at av øllum teimum, sum sótu í nevndum og ráðum hjá tí almenna, vóru 62 prosent menn og 38 prosent kvinnur. Javnstøða er í teimum nevndum og ráðum, sum hoyra undir Almannamálaráðið, Heilsumálaráðið og Fíggjarmálaráðið. Men ongin javnstøða er í Fiskimálaráðnum og Vinnumálaráðnum.

Í mansdomineraða Fiskimálaráðnum eru heili 93 prosent av nevndarlimunum menn og bara 7 prosent kvinnur. Í Vinnumálaráðnum, sum varðar av javnstøðuni í Føroyum, eru 68 prosent av nevndarlimunum menn og 32 prosent kvinnur. Í Mentamálaráðnum eru 58 prosent menn og 42 prosent kvinnur, so har er næstan javnstøða. Um javnstøða nakrantíð verður í nevndum og ráðum undir Fiskimálaráðnum, man vera ivasamt, tí undantøk verða viðhvørt latin at víkja frá meginregluni í lógini. Eitt tílíkt undantak varð latið í 2010 í sambandi við, at Fiskidaganevndin varð sett. Javnstøðunevndin heitti tó á Fiskimálaráðið um at hava javnstøðulógina í huga í sambandi við val av formanni, varaformanni og skrivara, so kvinnulig umboðan kundi tryggjast í nevndini. Men hesi áheitan fylgdi Fiskimálaráðið ikki.

## Skapa betri umstøður

Avbjóðingar eru sostatt framvegis, hvat